## EFTA-londini sinnað at rinda meira

**ES er sinnað at sleppa kravinum um atgongd til fiskivinnuna í Íslandi og Noregi, um londini rinda tað, sum ES vil hava.**

SAMRÁÐINGAR
*Árni Joensen:*

Noreg, Ísland og Liktinstein eru nú til reiðar at rinda ES væl meiri enn nú aftur fyri at fáa ein nýggjan EBS-sáttmála, sum skal koma í gildi, tá tey tígju umsøkjaralondini koma upp í ES 1. mai næsta ár.

Júst spurningurin um gjaldið til ES hevur gjørt, at samráðingarnar millum partarnar hava gingið sera illa, og í síðstu viku kom fram, at eydnast tað ikki at fáa semju fyri páskir, kann tað væl henda, at tey trý londini ongan sáttmála hava við ES aftan á 1. mai í 2004.

Men nú hava EFTA-londini boðið sær til at gjalda meira. Sum er rinda tey ES 185 milliónir krónur um árið. ES hevur kravt, at hetta tal skal fleirfaldast, soleiðis at tann norski parturin verður 2,8 milliardir krónur næsta ár, 4,5 milliardir í 2005 og 4,9 milliardir í 2006. Hesum hevur norska samráðingarnevndin víst aftur, men sambært blaðnum Aftenposten er stjórnin nú gingin við til at hækka gjaldið munandi. Hvussu nógv talan er um, verður tó ikki sagt.

## Sleppa kravi

Samráðingarleiðarin hjá ES, sviin Percy Westerlund, segði við norsku tíðindastovuna NTB í gjár, at tað nýggja tilboðið er eitt stig á røttu leiðini, men kortini ikki nóg mikið. Hann legði afturat, at sum tað nú gongur, verður trupult at koma til nakra semju fyri páskir.

ES hevur í samráðingunum kravt at fáa atgongd til fiskivinnuna í Noregi og Íslandi. Hesum hava bæði norðmenn og íslendingar víst aftur, og Percy Westerlund segði við NTB í gjár, at tað er ikki óhugsandi, at ES fer at sleppa hesum kravinum. Men kravið verður bert slept, um EFTA-londini rinda nóg mikið, legði hann afturat.

## Fyrsta gullnámið í Grønlandi

Grønlendingar kunnu nú fara at leita eftir gulli, eftir at Fællesrådet for Mineralske Råstoffer hevur givið tað fyrsta loyvið av hesum slagnum.

Tað hendi hósdagin, tá felagið Nalunaq Goldmine fekk einkarrætt til at grava eftir gulli í Kirkjuspírdalinum. Teimum nýtist tó ikki at leita, tí tað er staðfest, at ein lind av gulli er har.

Loyvið er galdandi í 30 ár, og hetta er tað fyrsta námsvinnutiltakið í Grønlandi, síðani blýggj- og zinknámið í Marmoriliik varð latið aftur í 1990.

Kanadiska felagið Crew, sum eigur meirilutan av partabrøvunum í Nalunaq Goldmine, hevur nýtt 130 milliónir krónur til tað ætlaða gullævintýrið í Grønlandi. Stjórin í Nalunaq Goldmine, Finn K. Mortensen, sigur við grønlendska útvarpið, at íløgurnar ætlandi fara at koma upp í einar 200 milliónir krónur.

# Føroyar gerast kendar í Belfast


*Stórsligna mentanarhúsið í Belfast, Lisburn Island Art Center*

**Í kvøld fara 20 føroyingar at skipa fyri føroyskum mentanartiltaki í stórsligna mentanarhúsinum, Lisburn Island Art Center, í Belfast. Tey fara undir heitinum, »Hendur«, við tónleiki, sangi og drama at vísa, hvat føroyingar við hondum sínum hava skapt**

FERÐ OG MENTAN
*Rúna Sivertsen*

Endamálið við ferðini er at lýsa føroysku mentanina við grundstøði í kristna siðaarvinum, sum jú er ein hornasteinur undir samfelagi okkara. Temaið á kvøldinum er »Hendur«. Víst verður, hvat føroyskar hendur hava skapt, t.d. bátin, grindaknívin, ullvørur o.s.fr.

Framført verður yvirhøvur føroyskur sangur og tónleikur. Hetta verður ein blanding av nýggjum og gomlum, sálmum og sangum og instrumentalum tónleiki. Kvøldið verður fjølbroytt, tí skift verður millum tónleikaframførslur, sang, myndir, filmsklipp, drama og framsøgu.

- Tað er mennandi fyri føroyingar at royna seg uttanlands, og møguleiki verður kanska at skapa nøkur góð sambond, sigur ein av stigtakarunum.

Nógvir kendir føroyskir tónleikarar verða við á ferðini saman við einum dramabólki úr Klaksvík. Tónleikararnir og sangararnir verða: Gunnar & Regin Guttesen, Karl Johannesen, Jákup & Jógvan Zachariasen, Pætur Dahl-Christiansen, Anna, Guðrun og Pætur Háberg, Pauli Djurholm, Bjarni Jøkladal. Í dramabólkurin er Sunniva Østerø, Nanna Joensen, Kristian á Lakjuni, Rógvi Laksafoss og Snorri Danielsen. Haraftur-at eru nøkur hjálparfólk við á ferðini.

Tað er kostnaðarmikið at fara uttanlands við slíkum tiltaki, men hetta er møguligt, tí tað verður stuðlað av fleiri grunnum og fyritøkum í Føroyum. Faldarar um Føroyar frá Ferðaráðnum verða lagdir inn í skránna fyri tiltakið, sum allir áhoyrararnir fáa.

Meira fæst at vita um mentanarhúsið í Belfast, Lisburn Island Art Center, á www.lisburn.gov.uk/.

Tey, sum skipa fyri siga, at ætlanin eisini er at fara á ferð í Føroyum við framførsluni. Stigtakari er Jógvan Zachariassen í Havn.

*Við í ferðini eru 20 fólk, ið fara at framføra m.a. drama fyri at lýsa føroysku mentanina*
*(Mynd Jens K. Vang*





# Skeltaverkstaður í Havn

*Bygningurin hjá Reproz við Grønlandsvegin, har skeltverkstaðurin húsast*
*Mynd Jens K. Vang*



*Fingin er til vega sera framkomin útgerð til at gera plakatir, skelti ol.*
*Mynd Jens K Vang*




*Sum dømi um nýggju vørunar kann nevnast prýðing av veggjunum í nýggju sølubúðini hjá Føroya Bjór í Havn*
*Mynd Jens K Vang*

VIRKI OG VØRUR
*Jan Müller*

Fyritøkan Reproz í Havn hevur nú víðkað um sítt virksemi fyri at ganga einum vaksandi tørvi og eftirspurningi á møti. Í hesum sambandi hevur fyritøkan sett á stovn ein sokallaðan skeltaverkstað, sum m.a. hevur til uppgávu at gera skelti, plakatir ol.

Verkstaðurin tekur sær av skeltum og stórum prentlutum annars. Eitt øki, ið veksur alsamt í Føroyum. Her tosa vit um dekoratión av bilum, bussum, handilsfasadum, fótbóltsvøllum, framleiðslu av básum til handilsstevnur o.a.m. Bara hugflogið setur mørk vísir stjórin á Reproz, Erling Eidesgaard á.

- Vit hava stovnað verkstaðin fyri at tryggja høga góðsku allan vegin. Av tekniborðinum til húsafasadina. Vit ganga sera høgt upp í myndagóðsku á prentlutum. Eisini teimum stóru. Tí var neyðugt at taka hetta stig.

Tey hava so stovnað verkstaðin fyri at kunna veita kundunum eina heildartænastu, har tað ber til at stýra góðskuni allan vegin. Kundin skal fáa alt tað honum tørvar í hesum sambandi á einum ogd sama stað, nevniliga í hølunum hjá Reproz á Grønlandsvegi í Havn.

Hvat skeltumtil uttandura brúk viðvíkur verða tey oftast laminerað, so at tey tola veður og vind. Tey prenta so eisini á stoff. Og støddirnar kunnu vera sera ymiskar, frá øl- og sodavatnsetikettum (klisturmerkjum) til húsafasadir.

Nýggi skeltaverkstaðurin heldur til í niðastu hædd í bygninginum hjá Reproz á Grønlandsvegi 38.

## VIÐMERKINGAR

# Innlit og vitan

**Øssur Winthereig**
*tíðindaleiðari*
*Sjónvarp Føroya*



Kenni meg noyddan at rætta nakrar misskiljingar, sum Niels Uni Dam setur fram í lesarabrævi. Tíðindadeildin í sjónvarpinum er ikki sett saman av tilvildarligum journalistum, sum bara finna upp á okkurt og so oysa tað út í hvørja stovu.

Tíðindadeildin hevur yvirskipaði mál, sum eg havi ábyrgdina av verða hildin. Tey eru millum annað at reka upplýsandi, fjølbroyttan, undirhaldandi og kritiskan tíðindaflutning. At ganga makthavarunum nær, er sera týðandi í hesum arbeiðinum. Altíð við tí í hyggju, at bera vitan víðari og geva innlit. Vitan og innlit, sum jú er ein av grundarsteinunum undir fólkaræðinum.

Tíðindasendingarnar eru lagdar til rættis, og einki innslag - eingin tíðindastubbi - fer í Dag og Viku uttan ein roynd er gjørd at røkka teimum yvirskipaðu málunum.

Innslagið týskvøldið um samgongukreppuna, var eins og øll onnur innsløg, ið kunnu gerast viðbrekin, grundiga diskuterað á redaksjónini. Og niðurstøðan var, at soleiðis vildu vit lýsa endan á politisku kreppuni. Og tað var ikki eitt skjal, sum einsamalt, gjørdi tað. Tað var eitt úrslit av, at vit nágreiniliga høvdu fylgt við í samgongukreppuni alla tíðina.

Innslagið týskvøldið gav eitt gott innlit í politiska spælið, sum hevur staðið við í eina stíva viku. Fyrst og fremst gav tað innlit í, hvussu politikarar - í hesum føri Høgni Hoydal - hugsa, tá ein politiskur boðskapur skal berast alment fram. Innslagið vísti, at politiska kreppan var drýggjað, við tí fyri eyga, at tað skuldi geva betur ekkó í pressuni. Og tað er einki forgjørt í tí, men tað er heldur einki forgjørt í, at veljarin eisini fær innlit í tað.

Ein av okkara eftirmetingum av innslagnum er, at Høgni Hoydal átti at havt møguleikan - longu í somu sending - at gjørt viðmerkingar til innslagið. Ætlanin var at hava løgmann og Høgna Hoydal í sjónvarpsstovuni, men løgmaður segði nei. Tí hildu vit, tað tað hevði givið ov stóra slagsíðu, um Høgni Hoydal var einsamallur. Soleiðis skuldu vit ikki havt hugsað - skilst.